# Kunnu spara meiri orku




*Ætla fólk at spara útreiðslur til orku og hita, er neyðugt við at gera ávísar íløgur. Hetta kann gerast fyri ein ávísan kostnað, men afturgjaldstíðin er heldur long*

*Tilvildarlig mynd: Jens Kristian Vang*

**SPARING** Í hesum døgum verður nógv tosað um hækkandi oljuprísir og hækkandi $CO_2$ útlát. Men hvat kann tann einstaki húsaeigarin gera?

Snorri Brend

Nógvir húsaeigarar farnir at hugsa um, hvussu alsamt vaksandi útreiðslan til upphiting kann gerast minni. Fleiri hava longu valt at royna alternativ til upphiting við olju. Orkudeildin á Jarðfeingi hevur í eina tíð fylgt við í royndum hjá húsaeigarum, sum hava fingið sær hitapumpur ella sólfangarar.

Tá ið royndirnar enn fyri tað mesta hava verið í stutt tíðarskeið, ber illa til at koma við neyvum staðfestingum um úrslitini.

– Men av tí at so nógv verður tosað um, hvussu væl tað loysir seg at gera íløgur í alternativa útgerð, hava vit valt at koma alment fram við tí vitan, sum vit halda okkum hava um hesi viðurskifti, verður sagt av Jarðfeingi.

## Bjálving

Royndirnar hjá Jarðfeingi vísa, at oljunýtslan í sethúsum vanliga er 15 til 20 litrar av olju um árið fyri hvønn fermetur av búðareali.

Hetta er sera høgt tal og vísir, at føroysk sethús sum heild eru illa bjálvaði. Í nógvum førum ber til at minka oljunýtsluna niður í eina helvt við bjálving.

Ein íløga í bjálving vil eisini skerja $CO_2$ útlátið. Um oljunýtslan fer niður í eina helvt, minkar $CO_2$ útlátið við trimum til fýra tonsum um árið í vanligum sethúsi.

– Útreiðslan til bjálving er sjálvandi tengd at standinum á húsunum. Men tað er sannlíkt, at ein íløga í bjálving kann vinnast inn aftur í einum tíðarskeiði, sum er styttri enn 15 ár, verður sagt.

## Sólfangarar

Royndir í Føroyum gjøgnum fleiri ár vísa, at hvør fermetur av sólfangara sparir húsarhaldinum umleið 50 litrar av olju um árið.

Ein vanlig sólfangaraskipan, sum er 10 fermetrar, vil skerja $CO_2$ útlátið við 1,5 tonsi um árið.

Íløgan í slíka skipan er umleið 60.000 kr. Við núverandi oljuprísum sparir húsarhaldið 3.500 krónur um árið.

Íløgan í sólfangaraskipanina kann tí vinnast inn aftur eftir umleið 20 árum.

## Hitapumpur

Ein hitapumpa ger oljunýtsluna í húsunum minni, men elnýtsluna størri, og tí eisini oljunýtsluna hjá SEV størri.

Tølini eru neyvt tengd at, hvussu væl hitapumpan virkar, eisini nevnt COP. COP er lutfallið millum framleidda hitaorku og tilførda elorku.

Um COP er størri enn 2, fremur hitapumpan niðurskurð í $CO_2$ útlátinum, sjálvt um øll elorkan verður framleidd við tungolju frá SEV.

Jú størri COP er, jú betri loysir íløgan seg fíggjarliga.

## Luft-luft hitapumpa

Luft til luft hitapumpur verða av nógvum nýttar sum ískoyti til sentralhita.

Hesar hava eitt høgt COP (umleið 4), og íløgan er avmarkað. Fyrimunirnir eru tí, at íløgan er skjótt vunnin aftur (umleið 6 ár), og at $CO_2$ útlátið fyri framleidda varman verður skorið við 40 %.

Vansar kunnu vera, at pumpan bara gevur varma til einstøk rúm, og at livitíðin er avmarkað til eini 10 ár.

## Luft-vatn hitapumpa

Hesar hitapumpur verða nýttar ístaðin fyri oljufýr og eru vorðnar alsamt vanligari í verandi og eisini nýggjum sethúsum.

Í mun til skipan við oljufýri er íløgan umleið 60.000 krónur hægri. COP liggur vanliga millum 2 og 3, alt eftir slag av hitaskipan (radiatorar/gólvhiti) og nýtslumynstri.

Eisini hesar hitapumpur minka um $CO_2$ útlátið. Afturgjaldstíðin við verandi orkuprísum er 15 til 20 ár.

## Long afturgjaldstíð

Aðrar hitapumpuloysnir sum vatn til vatn og jørð(berg) til vatn eru enn lítið royndar í Føroyum. Felags fyri tær eru, at tær eru dýrari at seta upp, men hava longri livitíð og síggjast og hoyrast minni í nærumhvørvinum.

Samanumtikið kann sigast, at omanfyri nevndu tiltøk í sethúsum øll geva minkandi oljunýtslu og harvið minkandi $CO_2$ útlát. Samstundis kann sigast, at íløgurnar hava heldur langa afturgjaldstíð.


FØROYAPRENT



HITAMYNDIR
VIT VITA MEIRA

Baldvin Harðarson
útbúgvin thermografur

• Bygningar
• El-skipanir
• Bjálving
• Umvælingar- og byggieftirlit

Í Geilini 19 • FO-380 Sørvágur
Telefon: +298 520 700
E-mail: hitamyndir@gmail.com
www.hitamyndir.com

0° 5° 10° 15° 20°